

*36 ára gamli Jan Otto og 38 ára gamli Peter eru ávikavist íløgustjóri og stjóri í Kaupthing Bank. Bankin hevur nú tikið enn eitt stig longur fram á leiðini til at gerast ein veruligur peningastovnur í Føroyum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

er, kann vera torført at siga, heldur Peter Holm.

Hóast Kaupthing longu nú, umvegis móðurbankan í Íslandi, hevur fingið ein rímuliga stóran part av køkuni í Føroyum, so er Peter Holm ikki nøgdur.

- Tað er ikki nakað ókent fyribrigdi, at um tú fyrst byrjar at verða nøgdur, so blívur tú dovin, og so ert tú liðugur, sigur Peter Holm.

Jan Otto Holm letur ongan iva vera um, at Kaupthing hevur slóðað veg fyri hinum peningastovnunum á íløguøkinum. At hinir eru komnir aftaná og eru farnir at gera tað sama, tulkar hann sum, at Kaupthing hevði fatur á rætta endanum frá byrjan av.

- Vit vóru teir fyrstu í Føroyum við ymsum tænastum. Vit vóru teir fyrstu sum burturav vendu okkum til kundar, sum ynsktu at gera øðrvísi íløgur enn at seta pengar á bók, og vit vóru eisini teir fyrstu sum byrjaðu at gera tær halltryggjaðu íløgurnar, sum tað nú er so nógv fokus er á, sigur hann.

*Ert tú ikki bangin fyri, at tit verða yvirháløðir at hinum.*

- Nei, als ikki. Eg trúgvi upp á okkara dygdir, og eg eri als ikki bangin fyri kapping, tvørturímóti er tað bara gott, leggur hann afturat.

Men heldur ikki á íløguøkinum ætlar Kaupthing sær at vera discount-banki, men kortini ivast Jan Otto ikki í, at teir vera kappingarførir.

**Burtur við antitrust-lóg**

Eitt sunt og væl rikið vinnulív er ein fortreyt fyri, at lánveitarar eisini kunnu vinna pening, og tí fylgir stjórin á Kaupthing við gongdini á hesum øki.

*Væntar tú, Peter Holm, at vit koma at síggja eitt meiri fjølbroytt vinnulív í Føroyum í framtíðini?*

- Tað vóni eg. Vit koma helst at síggja eitt meiri dynamiskt vinnulív við einum meiri dynamiskum eigaraskara. Teir nógvu virkishandlarnir, vit hava sæð seinastu tíðina, eru heilt avgjørt eitt gott heilsutekin. Alsamt størri krøv verða sett til nýggju eigararnar um renting av eginpeningi, og tað haldi eg er sunt, sigur Peter Holm

Men fer tað ikki at gerast ov tungt hjá nýggju eigarunum at forrenta eginpeningin, tá teir seta seg í so nógv størri skuld, enn gomlu eigararnir gjørdu?

- Eingin sigur, tað skal vera so lætt, men teir nýggju eigararnir skulu duga betri enn teir gomlu. Og at teir nýggju eigararnir, hvør í sínum lagi, seta størri krøv til sín sjálvs er nakað, sum vil gagna øllum samfelagnum sum heild, heldur Peter Holm.

Peter Holm er ikki fegin um, at broytingin í lógini um vinnuligan fiskiskap, sum verður løgd fyri tingið í næstum, setir stórar avmarkingar fyri samanleggingum av fiskiloyvum. Hetta kallar hann fyri antitrust-lóg.

- Hesar forðingar fyri samanleggingum seta fiskivinnuna í eitt landbúnaðarlíknandi støði, har hvør bóndi hevur sín garð. Hetta er ikki gott, tí fyritreytin fyri at fáa sum mest burturúr fiskivinnuni er, at ríkidømið verða gagnnýttir á mest effektivan hátt, og tað vísir seg, at tess størri eindirnar eru, tess betri eru tær førar fyri at vinna pening, sigur Peter Holm.

Hann heldur ikki, at miðsavnan av fiskiloyvum í sær sjálvum er av tí ónda.

- Eg síggi tað ikki sum nakra náttúrurlóg, at ein og hvør føroyingur skal kunna fáa eitt fiskiloyvi. Um málsetningurin er at býta fiskatilfeingið út á nakrar smáar eindir, so fáa vit ikki gagn av teimum fyrimunum, sum stórrakstur hevur, heldur stjórin í Kaupthing.

**Pilka ov nógv við smálutir**

Peter Holm heldur, at føroyskir politikarar hava lyndi til at blanda seg ov nógv í smálutir hjá vinnulívinum, samstundis sum teir hugsa ov lítið um tær stóru linjurnar – ella karmarnar – sum vinnan upp á longri tíð skal virka undir.

- Tað er umráðandi at skapa støðugar politiskar karmar fyri vinnuna. Politikarar hava ringt við at halda fingrarnar burtur, har teir burdu latið vera við at pilka við. Her hugsi eg serliga um antitrust-lógina, sum nú er komin á tingborð, sigur hann.

*Er nakað gott at siga um vinnupolitisku karmarnar í Føroyum?*

- Ja, har fekst tú meg. Tað er altíð lættari at finnast at enna at rósa. Men tá vit nú eru inni á hesum, lat meg so nevna partafelagsskattin. Tað er sera positivt, at partafelagsskatturin er lutfalsliga lágur, og ynskiligt hevði verið, um henda gongdin hevði hildið fram. Á tann hátt kunnu vit draga útlendsk virkir hendanvegin at gera íløgur í okkara landi, sigur Peter Holm.

*Partafelagsskatturin er í løtuni 18 prosent. Er tað ikki rímuligt, at vinnan eisini lyftir sín part av skattabyrðuni?*

- Jú avgjørt!

So er eitt mark fyri, hvussu nógv partafelagsskatturin kann lækka?

- Tað er eisini ein spurningur, hvat tú vilt við partafelagsskattinum. Vilt tú draga fremmandar íløgur hendavegin, so skulu vit hava nakrar fyrimunir, sum okkara grannalond ikki hava, sigur hann.

Samanumtikið heldur Peter Holm tað vera av alstórum týdningi, at vinnan fær støðugar karmar at virka undir, og at tað ikki altíð verður løggivið hvørja ferð, okkurt smávegis er á vási. Og hann skilir framvegis ikki, hvat endamálið er við antitrust-lógini hjá Fiskimálaráðnum.

Men sum virkandi vinnulívsmaður innan fíggjarheimin tillagar hann og Kaupthing seg til teir givnu karmar, sum politikararnir seta.

Soleiðis er tað!

Sosialurin